## DAGSINS MEINING

# Studningur

Nógv taka sær heiðurin av, at føroyska vinnan er so nógv minni heft av studningi í dag enn fyri 10 – 15 árum síðani. Fólkaflokkurin letst sum um, hann eigur heiðurin. Samgongurnar frá 1990 til 1994 tóku tyngstu tøkini, og var tað ikki Fólkaflokkinum at takka, at nógvar stuðulsskipanir vóru avtiknar. Tað var ein kombinatión av umstøðunum og treiskni frá samgongufeløgunum hjá Fólkaflokkinum. Samgongan millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin slitnaði tá, tí Fólkaflokkurin hevði ikki rygg til neyðugu tiltøkini.

Allir teir almennu grunnarnir, ið verða stovnsettir, tað verði seg vinnuframagrunnar ella klekingardeplar, eru stuðulsskipanir. Ein skattalætti til sjómenn er eisini ein stuðulsskipan til reiðaríini. Tað grovasta dømi um almennan studning er, tá man ger, sum Jørgen Niclassen gjørdi, tá hann avskrivaði skuld til júst rækjuflotan. Tá er ikki talan um veðhald ella studning, men heldur reina forering av skattgjaldarans peningi. Tað er vert at leggja til merkis, at júst Fólkaflokkurin stóð á odda fyri hesum átaki.

Óansæð hvat man heldur um studning, so er tað sera naivt, at halda, at tað almenna nakrantíð kann yvirláta alt til marknaðarkreftirnar, hóast nógv tykjast halda hetta í hesum døgum, har alt er gingið framá í fleiri ár á rað. Marknaðarkreftirnar klára ikki alt – vit kunnu bara hyggja at Føroya Banka, Fiskasølu, Fiskavirking, har landið mátti taka upp eftir fría initiativinum.

Tað almenna má ikki lata nakað, uttan at fáa nakað afturfyri. Tìðin er farin frá fólkafloksforeringum. Vit hava dømi, har landið hevur stuðlað við góðum úrsliti, men hevur fingið nevndarlimir ella ávirkan afturfyri. Eisini hevur talan verið um, at landið verður keypt útaftur úr vinnuvirksemi. Einki fyri einki má verða leiðin frameftir.

Hevði vinnan dugað betur at konsoliderað seg, so hevði ikki verið tørvur á orðaskiftinum, sum vit nú eiga at hava um rækjuflotan. Føroyska vinnan hevur tíverri ofta víst seg at verið ov stuttskygd. Eitt gott dømi um hetta er trygdargrunnurin hjá alivinnuni. Ein slíkur grunnur varð settur á stovn í 80'unum, men seinni syrgdu borgarligu flokkarnir, uttan at vinnan mótmælti, fyri, at inngjøldini steðgaðu. Úrslitið er, at aftaná rekordár í alivinnuni, so er í minna lagi at standa ímóti sjúku og øðrum.

Vit hava ein blandingsbúskap og viðurkenna flestu flokkar hettar. Fólkaflokkurin er eitt undantak. Hann letst verða fyri, at marknaðarkreftirnar skulu klára alt, men tá til stykkis kemur, so er hann fremstur fortalari fyri, at landið skal lata pening til privatar fyritøkur, uttan at fáa nakað afturfyri – vit síggja, hvat Jørgen Niclassen gjørdi, tá hann kom í Tinganes.

Tað er vert at hava í huga stuðulin, sum tað almenna á sinni lat til Smyril Line og sum gjørdi, at fyritøkan kom fyri seg og kundi mennast. Seinni fekk tað almenna stuðulin aftur. Um tað eru slík modell vit eiga at geva gætur aftur ella ikki er ein politiskur spurningur. Og tað er væl eisini til slíkt, at vit hava fingið dialogin og orðaskiftið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ikki havnarhús, men tóm hús

**Eivin H. Jacobsen**
*Sørvág*



Í sosialnum 10.01.02 er samrøða við undirritaða við yvirskriftini "Hundraðtals tómu húsini á bygd" Vilja hava avgjald og bústaðarskildu.

Hettar kann virka sum ein rættuliga áloypandi og provokerandi yvirskrift, sum lesarin longu í yvirskriftini tekur avstand frá og fer at hugsa um ognarskatt og annað líknandi, sum fær blóðtrýstið upp í vandahæddir. Innihaldið, sum er fakta, kámast burtur, men er sera viðkomandi ímillum okkum kommunalpolittikkarar og burdi fingið landspolitikkarar at spurt seg sjálvar, um okkara bústaðarpolitikkur er nøktandi, ella um hann ikki skuldi fylgt tíðini og havt fleiri valmøguleikar heldur enn at kveistra trupulleikan frá sær og siga , at framtíðarbústaðarviðurskifti er ein kommunal uppgáva.

Í greinuni verður víst á eina óhepna gongd viðvíkjandi tómum sethúsum, sum allar bygdir uttan fyri Havnina hava at dragast við – summar størri enn aðrar. Løgmaður kallar tey spøkilsishús, men onkur vil kalla tað spøkilsisbýlingar.

Tá bygdir kunnu vísa á, at 10% ella meir av øllum sethúsum í einari bygd standa tóm, sum er ogn hjá bygda/avbygdafólki, samstundis sum trýstið á kommunurnar økist viðvíkjandi útvegan av grundstykkum, eiga vit at hava peikifingurin á lofti,og spyrja okkum, um ikki ein bústaðarpolitikkur vantar, og skal hettar ikki skiljast, sum jagstran eftir teimum, sum á ein ella annan hátt hava ognað sær hús úti á bygd.

Um 10% av sethúsunum høvdu staðið tóm í høðustaðnum, hevði hettar tal verið uppi á sirka 6-700 húsum, sum svarar til, at størsti partur av Argum lá myrkur. Um hettar hevði verið veruleikin, eri eg sannførdur um, at allir møguleikar høvdu verið troyttir, áðrenn Hoyvíkshagin hevði verið tikin til byggiøki, men í høðusstaðnum er trupulleikin tað øvugta.

Undirritaði er samdur við løgmanni, tá sagt verður at ognarrætturin eigur at verða virdur, og tí er hettar ikki nøkur løtt uppgáva. Í politikki eru ongar sjálvsagdar og einfaldar loysnir, men hettar frítekir okkum ikki fyri at taka málið upp og finna eina loysn, sum liggur fram í tíðuna og við einari hugburðsbroyting, fáa okkara borgarar at taka undir við.

Sum tað hevur verið sagt fyrr, so er eingin lóggáva á økinum, og so gott sum eingir aðrir møguleikar eru enn at byggja nýtt. Hettar fer ikki at vera nøktandi í framtíðini, og enn minni øll ynskja hettar av fíggjarligum orsøkum. Fyri at útinna alternativar bústaðir, mugu nakrar politiskar avgerðir takast, sum í minsta lagi javnseta alla bygging fíggjarliga. Her verður hugsað um rentufrádráttin og MVG, sum ikki er javnsett, um vit tosa um alternativa bygging.

Hvat avgjaldinum viðvíkur, so fingu fleiri hjartabankan, tá eitt gjald uppá 25-30.000 kr bleiv nevnt, men um hettar tal kann halda lív í kjakinum, so kann tað gott standa 130.000 fyri mína skyld, men givið er, at eitt ella annað lyklabýti átti at vera nýtt, hvat tað so skuldi verið.

Í fíggjarætlanunum hjá kommununum er stórsti parturin rakstur, og íløgur, ein partur av rakstrinum og íløgunum fer til viðlíkhald og nýgerð í bygdunum, tað kann vera vatn, kloak, gøtuljós og aðrar ábøtur. Her verður ikki tikið hædd fyri, um húsini standa tóm ella tað verður búð í teimum, so spurningurin um avgjald (ikki ognarskatt) skal vera á tóm hús, ella hvussu skattakrónurnar hjá borgaranum í kommununum rættvísast skulu nýtast skal verða upp til lesaran at taka støðu til.

Í Dimmalætting og Sosialinum 17. januar hevur Heðin Mortensen eina viðmerking, sum hann kallar Havnarskatt. Eg skal viðganga, at henda orðing er óheppin, og um at punktera innihaldið av samrøðuni, men tá Heðin Mortensen tosar um lønir, sum verða útgoldnar í Havn til avbygdafólk, so hevur hettar einki við innihaldið í samrøðuni at gera, hettar er ein útviklingur, sum kemur at vinda uppá seg, so hvørt sum tær fysisku forðingarnar í samfelagnum verða burtur. Her kann hugsast, at innan fyri 10 ár, verður tað ikki óvanligt hjá einum klaksvíkingi at arbeiða vesturi í Vágum ella umvent, og tað er jú endamálið við teimum stóru íløgunum í tunlar, sum eru og vera í gerð framtíðini, men tá Heðin Mortensen skyldar avbygdafólk fyri at fara avstað við øllum arbeiðum í Havnini, kann eg ikki ímynda mær nakra aðra forkláring enn, at øll tann almenna umsitingin liggur í høðusstaðnum, og at avbygdafólk eru betri kvalifiserað ella hvat?

Eisini verður nevnt, at Tórshavnar kommuna skal asvaltera vegir so píkaskøddir bilar av bygd kunnu koma til Havnar. Til hettar er at siga, at løgtingið hevur júst avtikið asvaltstudningin, hettar var ein skipan, har kommunurnar eftir fólkatalinum fingu eina árliga upphædd at asvaltera fyri. Her hevur Havnin fingið nógv tann størsta partin, sum narúrligt er, um Heðin Mortensen hevur sovið í tímanum ella tikið undir við uppskotinum, dugi eg ikki at svara uppá, men hettar var ein skipan, sum var skilagóð og rættvís, eg fari at heita á Heðin Mortensen at fylgja væl við ætlanunum hjá landsstýrinum um at leggja uppgávur út á kommunurnar, fyri síðan seinri at sleppa at siga, at hettar er ein kommunal uppgáva/trupulleiki.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Og so ellisheim fyri rest!

**Heðin Mortensen,**
*løgtingsmaður*



Føroyingar flestir eru limir í einum fakfelag ella áhugafelag, sum samráðist teirra vegna.

Tá arbeiðsfólk fara til arbeiðis er tað ikki tí, at tey treytaleyst geva seg inn undir arbeiðsgevaran ella mangla sjálvsavgerðarrætt. Tá arbeiðsgevarin flytir lønir ella pensjónsgjald, er tað heldur ikki tí, at hann vil mutra arbeiðsfólkið ella verður rændur.

Báðir partar velja at gera eina avtalu. Innihaldið stendur fyri tað mesta í høvðussáttmála, sum fakfeløgini samráðast um. Sámráðingarnar gera av, hvørji rættindi og hvørjar skyldur partarnir eiga.

Føroyar hava ein sáttmála við Danmark. Men hjá okkum hevur nevndin gjørt av, at vit uttan nakað skulu lata 366 milliónir krónur frá okkum.

Formliga yvirtaka vit nøkur málsøki, men tey hava longu í nógv ár verið undir okkara ræði. Og síðani blokkurin kom, hava pengarnir úr Danmark ikki verið markaðir til ávís endamál.

Fyri 366 milliónir krónur kundu vit havt goldið nýggja Smyril í einum, vit kundu hækka pensjónirnar, og vit kundu sett stovnsfæ í íbúðargrunnar – og so kundu vit bygt ellisheim fyri rest.

Samgongan við fólki sum Bjarna Djurholm og Helenu Dam á Neystabø á odda høvdu klárað seg illa sum fakfelagsfólk: "vit vilja varveita sáttmálan og júst sama uppgávubýti, men vit vilja gjarna hava 40% minni útgoldið!"

Samgongufólk eiga at forklára fólki, hví tey heldur vilja lata vera við at byggja neyðugu íbúðirnar, og hví tey heldur vilja læna pengar til undirsjóvartunnlarnar enn at brúka teir pengar, sum vit hava samráðst okkum til.

# Undirbrotligheitin hjá Torbjørn Jacobsen

**Thomas Arabo**

Føroyingar eru ikki so vánaligir, at teir ikki kunnu tala sína egnu søk. Mær vitandi er tað eingin danskur fólkatingslimur, ið sigur seg umboða Føroya søk í loysingarspurninginum.



Um so var, so hevði eg nokk eisini hildið tað var ódámligt, eins og eg haldi tað verða ódámligt, tá Tjóðveldismenn mobilisera grønlendskar fólkatingslimir fyri eina søk, ið teir ikki klára at skapa undirtøku fyri her heima.

### Trælalyndið

Tað má verða trælalyndið, ið er so inngrógvið í parti av føroyska fólkinum. Ístaðin fyri at hava álit á egnum landsmonnum, so fara Tjóðveldismenn til útlendingar at fáa stuðul í loysingarspurninginum. Er tað ikki onkur íslendskur professari í Lund ella ST, so eru tað grønlendskir fólkatingslimir. Alt gott um hesar menn, og alt gott, um at biða um fakliga ráðgeving uttanlands í allari almindeligheit, men tá tað kemur til spurningin, um vit skulu loysa ella ikki, so er tað føroyingin, man skal spyrja, og ikki øll møgulig onnur. Alt annað er tekin uppá avmakt og – ja Torbjørn Jacobsen – undirbrotligheit.

### Lat okkum betala við kassa 1 so hvørt

Tjóðveldisflokkurin hevur tann trupulleikan, at meirilutin av Føroya fólki vil ikki fylgja mannminkandi ætlanini um at loysa uppá kreditt frá dønum.Aftaná at hava malið í ring í góð trý ár, so eru vit aftur har, vit hava verið seinastu 50 árini. Einasti munur er, at nú tykjast øll glað.

Lat okkum yvirtaka málsøkini eitt fyri eitt og betala við kassa 1 so hvørt. Tað er ein virðilig gongd, har eingin hevur orsøk til at vera undirbrotligur. So kann man kanska síggja fram til, at veruligur politikkur verður settur aftur á dagsskránna. Har burdi verið nógv at tosa konstruktivt um.

# Barnaansing á Landssjúkrahúsinum

**Heri Joensen**

Nú lata Tórshavnar Kommuna og Føroya Tele ein nýggjan barnagarð upp við Sundsvegin í Havn. Hetta eru undirritaðu tey fyrstu at fegnast um. Tó eru ávís ting, sum kunnu verða trupul at skilja, og vilja undirritaðu heita á landsins mynduleikar um at hjálpa okkum:

1. Hví kann landsfyritøkan Landssjúkrahúsið ikki gera íløgur í ein barnaansingarstovn, tá landsfyritøkan Føroya Tele kann?

2. Hví kann peningurin hjá skattgjaldaranum fara til barnagarð á Føroya Tele, men ikki á Landssjúkrahúsinum?

3. Hví stendur í § 7 í "Løgtingslóg nr 67 frá 10. mai 2000 um Dagstovnar og Dagrøkt" at kommunan kann geva stovnum loyvi at seta á stovn dagstovn um hetta ikki er vilji landsstýrisins ? Hvørjir stovnar kunnu fáa loyvi ?

4. Hví kunnu nøkur fá prosent av íløgujáttanini til Landssjúkrahúsið komandi árini ikki nýtast til barnaansing, tá hetta er so átrokandi?

5. Er tað Landsstýrismaðurin í heilsumálum ella Føroya Løgting sum játtar pening til Landssjúkrahúsið?

6. Er tað sjúkrahúsleiðslan ella Landsstýrismaðurin í heilsumálum sum rekur Landssjúkrahúsið?

Vónandi ber til at fáa svar uppá hesar spurningar. Um áhugi er fyri at hoyra meira verður pallborðsfundur um evni í Norðurlandahúsinum 30. januar kl. 19.30.

Vegna Foreldrafelagið í Havn.

# Skeiv adressa Guttormur

**Jan Müller,**
*blaðstjóri*



Guttormur Djurhuus skrivar í Sosialinum í gjár m.a. hetta: "Ein sjúkrasystur, umframt tær dulnevndu í Sosialinum, hevur eisini latið sína rødd hoyrt. Vert er at í hesum sambandi at bíta merki í, at Sosialurin alment sigur seg einki vilja hava við dulnevnd lesarabrøv at gera. Her er so trongdin til at birta uppundir klandur sterkari enn almennu prinsippini".

Tað er í fínasta lagi, at Guttormur Djurhuus, sum annars plagar at vera skilagóður og hava ein kontantan og greiðan penn, finst at Sosialinum, tá hann heldur hetta vera rætt og rímuligt. Tað hevur hann gjørt í øðrum samanhangi eisini. Sum blað eiga vit sjálvandi at taka til okkum sakligan og skilagóðan kritikk. Í hesum førinum rakar Guttormur tó heilt við síðuna av. Sjálv adressan er skeiv og skuldsetingarnar móti Sosialinum tí eisini órættvísar.

Sosialurin hevur ikki, sum Guttormur førir fram, prentað dulnevnd lesarabrøv frá sjúkrasystrum í sambandi við B6 málið. Her má okkurt vera komið í bland hjá tí annars so gløgga og skarpa eygleiðaranum.

Dugi bert at síggja, at tað má vera annað blað hann hugsar um. Dimmalætting prentar t.d. leygardagin 29. desember lesarabræv undir heitinum "Ein heilsan frá nøkrum av sjúkrasystrunum á B6". Hetta brævið kom ikki í Sosialin. Fyri at koma í blaðið mugu nøvnini á teimum, sum skrivað hava, standa undir. Og tað gjørdi tað ikki. So her mistekur Guttormur seg, helst av ósketni. Men eitt sindur óumhugsað og flóvisligt má sigast. Ella – kann tað hugsast, at hann her helt seg hava fingið eitt kærkomið høvi at skjóta av onkrar av sínum agressiónum móti blaðnum!

Undirritaði roknar við at fáa eina almenna umbering frá Guttormi Djurhuus fyri hetta hansara óhepna mistak og ósakliga álop á blaðið. Rokni við at hann fer at koma til ta niðurstøðu, at Sosialurin gjørdi rætt, tá blaðið fyri nøkrum árum síðani gjørdi av ikki at loyva dulnevndum lesarabrøvum. Trupulleikin er bara tann, at soleingi onnur stór bløð loyva dulnevndum lesarabrøvum, so hendir skaðin kortini. Og umrødda lesarabræv frá nøkrum sjúkrasystrum á B6 hevur eftir Guttormsa tykki verið málinum til størri skaða enn gagn. Og út frá tí kann eg bert koma til ta niðurstøðu, at Guttormur heldur tað vera skeivt av bløðunum at koyra slík dulnevnd lesarabrøv í.

Nú vit eru við tey dulnevndu brøvini, so hví ikki stutt umrøða hetta so týðandi evnið. Okkara hugsan á Sosialinum er tann, at besta grundarlagið undir dialoginum og orðaskiftinum er at spæla við opnum kortum. Hóast samfelagið er lítið, og tað tí kann vera ynskiligt at sleppa undan at leggja navn til alt, so man hetta kortini vera rætta leiðin. Hóast blaðleiðslur, sum góðtaka dulnevnd brøv, siga, at tær altíð tryggja, at tað, sum fer út dulnevnt, er borðbart, so er tað ikki nóg góð trygd. Stór og álvarslig mál sum eitt nú hetta við B6 mugu verða viðgjørd opið og ærliga. Vita fólk at tey ikki nýtast at seta sítt navn undir og harvið standa til svars fyri tað tey skriva, so verður orðaskiftið eisini hareftir.

Má eisini ærliga siga, at eg hvakk við, tá eg læs hetta brævið í Dimmu beint fyri nýggjár. Helt málburðin vera ov grovan og álopini ov persónlig. Tað er júst fyri at sleppa undan slíkum, at tað verður kravt, at fult navn skal undir. Nú skal eg ikki leggja meg út í, hvørjar treytir kappingarneyti okkara setir til innsent tilfar. Men tað tykist mær løgið nú vit skriva 2002, og blaðið er mannað við so nógvum ungum og góðum kreftum, at henda fornaldarleivd, sum eitur dulnevnd lesarabrøv, framvegis skal standa so høgt í metum á einum so stórum og týðandi blað. Teir um tað. Men vita skulu teir, og hetta eru vælmeint ráð, at vit ongantíð hava iðrað okkum um avgerðina vit tóku fyri fimm árum síðani, ikki longur at loyva dulnevndum lesarabrøvum. Har fólk kortini av gomlum vana hava sent okkum brøvini dulnevnd, hava vit í besta forstáilsi fingið tey til at seta sítt navn undir kortini.

Tí er hetta eisini ein spurningur um tilvenjing. Ein spurningur um at sleppa okkum av við gamlar ringar vanar. Ein spurningur um at lyfta upp orðaskiftið á eitt hægri støði. Sjálvur loyvi eg mær at halda, at stig okkara hevur verið við til at lyfta orðaskiftið uppá á eitt hægri støði. Skal tó eisini taka í egnan barm og viðganga, at tað í onkrum føri átti at verið sett størri krøv til navngivin brøv, har tað verða gjørd grov álop á nevndar persónar. So fyri tað at man hevur slept teimum dulnevndu, sleppur tað ikki okkum, ið hava ábyrgdina, undan at hava eitt vakið eygað við tí, sum verður sent bløðunum.

Til Guttorm, sum áður hevur funnist at okkum á Sosialinum fyri ikki at loyva dulnevndum lesarabrøvum, kann eg bert siga, at tað er gott, at tú er komin uppá aðrar tankar, at tú nú hevur sæð, hvussu dulnevnd lesarabrøv kunnu birta uppundir klandur. Bert spell at tú leggur eftir teimum, sum hava tikið hetta til eftirtektar fyri langari tíð síðan. Adressan var skeiv og vil eg mæla tær til næstu ferð at fara til røttu adressuna. Annars gott nýggjár Guttormur. Vón mín er, at tú ikki gevst við at koma við tínum oftani beinraknu og viðkomandi viðmerkingum. At onkur so rakar við síðuna av, er ikki meira enn menniskjansligt. Okkara samfelag hevur brúk fyri pennum sum tínum. Harfyri nýtist man ikki altíð at vera samdur. Men tað er m.a. við dialoginum vit skulu byggja land.